# Mangan var buldrasligt

– Tann,sum hevur siglt nógv við Smyrli, hevur havt nógvar buldrasligar túrar. Tað sigur Kári Thomasen á Tvøroyri. Og hann veit, hvat hann tosar um, tí hann hevur verið við til at slíta tríggjar Smyrlar upp



*Kári Thomsen hevur siglt við trimum Smyrlum, tað mestu tíðina sum kokkur. Hann heldur, at siglingin fyrr og nú kann ikki samanberast. Fyrr sigldi Smyril annanhvønn dag og tað tók ofta tað mesta av einum samdøgurið at koma ímillum Havnina og Suðuroynna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**STRANDFERÐSLUSIGLING**
*Áki Bertholdsen*

– Siglingin, sum nú er við Smyrli, kann als ikki samanberast við tað, sum var fyrr. Fyrr var tað ofta eitt øgiligt knoss, men nú er tað ikki at samanlíka.

Tá ið Kári Thomasen á Tvøroyri tosar um siglingina við Smyrli, veit, hvat hann tosar um, tí hann hevur siglt við ikki færri enn trimum Smyrlum og er sostatt so royndir í strandferðslusigling sum fáur.

Fyrsti Smyrilin, hann kom umborð, var tann gamli guvurikni Smyrilin, sum fór í søguna í sekstiárunum, tá ið tann Smyrilin kom, ið varð bygdur á Tórshavnar Skipasmiðju.

Men tað heilt stóra frambrotið kom í 1975, tá ið Smyril, sum nú fer í søguna, varð keyptur.

Hann var fyrst messudrongur umborð, men síðani varð hann kokkur og tað var hann til hann legðist á land fyri nøkrum árum síðani.

– Eg havi ongantíð lært til kokk. Tað eg dugdi, lærdi eg frá kokkunum, sum vóru undan mær og væl bar til, heldur hann.

## Eitt knoss

Siglingin við tí guvurikna Smyrli varð mangan eitt satt knoss. Siglingin varð skipað soleiðis, at siglt varð bygd úr bygd allan vegin við fólki og farmi, so mangan tók ferðin ímillum Havnina og Suðuroy tað mesta av einum samdøgurið.

Tá kundi av sonnum sigast, at Smyril bant landið saman. Og hann átti uttan iva eisini høvuðsheiðurin av, at fólk yvirhøvur búleikaðist á bygd. Hann var lívlínan ímillum tey ymsu bygdirnar og ímillum bygdirnar og tey tey stóru plássini.

– Vit førdu rættiliga nógvan farm ímillum bygdirnar. Og tað var fjølbroyttur farmur, tí har var alt frá timbri umvegis maskinur av umsum slagi, til livandi kýr.

Hann sigur, at allur farmurin varð handaður umborð, so tað var ofta tungt, so tað var ógvuliga nógv lossing og lasting. Mangan var seint, tá ið tað varð liðugt at lossa og so at spula dekk, so svøvnur var ikki altíð so nógvur

Tá sigldi Smyril bara annanhvønn dag: Norður ein dag og suður dagin eftir. Men hvønn mikudag sigldu vit inn í Eysturoynna, bygd av bygd, líka norður til Gjáar og tað kom eisini fyri, at vit sigldu til Vágar.

Eitt skifti í fimtiárunum mátti Smyril leggjast, tí onki kol var at fáa.

– Vit brúktu enskt kol og tað fekst onki kol, so hann varð lagdur.

Og táið tosið kemur inn á flyta dýr, kemur Kári at hugsa um eina stuttliga hending.

– Vit skuldu flyta eina kúgv til Skálavíkar. Tað bar ikki at leggja at, so kúgvin skuldi lossast umborð á ein lítlan bát uttanfyri lendingina.

Hetta var við Ternuni. Kúgvin varð løgd í seðlar og hiva fyri borð. Men tíverri, beint sum hon hekk uppi yvir tí lítla bátinum, leyp rættiliga ilt á hana. Neyðars avgreiðslumaður í bátinum bleiv at kroppi í mykju. Tað varð eitt øgiligt lív, men hann tók tað pent- fekk sær upp í lógvan av sjógvi og skolaði tað ringasta burturúr eygunum og so var ikki meiri um tað.

## Varð heilt skjótt ov lítil

Annars heldur Kári, at tað var eitt mistak at byggja tann Smyrilin, sum varð bygdur í Havn í sekstiárunum tí longu tá skuldu vit havt fingið eina bilaferju.

Tann Smyrilin flutti eisini nógvan farm, men hann kundi eisini taka nakrar fáar bilar. Var talan um smáar bilar, fingu vit fimm bilar í lastina og fimm kundi so standa á dekkinum.Tað varð ikki altíð so heppið fyri bilarnar, tí ofta vóru teir undir í sjóroki, men tað var onki annað.

Bilarnir vórðu lossaðir umborð, men tað galt um at vera í góðari tíð. Skuldi ein hava bil ímillum Suðuoynna og Havnina á páskum, mátti biðjast um pláss longu á jólum.

Tá ið bilaferjan kom í 1975, vóru tað mong, sum hildu, at tað var ørskapur, tí hann skuldi vera alt ov stórur.

– Men eg veit ikki. Longu tað fyrstu jóansøkuna, sum var í Vági, var ov lítil, tí tað vóru yvir 1000 fólk við suður til Vágs á